# Supervisjón og faklig vegleiðing

### 1 1/2 ára eftirútbúgving hjá Dispuk, ið byggir á systematiska og narrativa hugsan. 400 lektiónir

Undirvíst verður í 6 modulum, ið hvørt varir eina viku. Millum modulini arbeiða luttakararnir sjálvstøðugt í minni bólkum.

**Endamálið** við eftirútbúgvingini er at luttakararnir skulu gerast førir fyri at veita supervisjón í samsvari við systematiska og narrativa hugsan og meginreglur.

**Luttakaratal:** Í mesta lagi 15

**Útbúgvingarábyrgd og undirvísari:**
Dorte Lund-Jacobsen, DISPUK: lund-jacobsen@dispuk.dk

**Samskipari:**
Eydna M. Iversen Lindeskov: eydna-i@post.olivant.fo
& Psykiatriski depilin, Bergit Weihe: bergitw@lsh.fo

**Byrjan:** 5. september 2005. Undirvísingin er á donskum.

**Stað:** Landssjúkrahúsið, Psykiatriski Depilin

**Kostnaður:** 38.200,- íroknað margfaldað tilfar og kaffi/te við tilhoyri. Møguleiki er at gjalda helvtina í 2005 og restina í 2006.

**Tilmelding:** Skrivliga/faks/teldupost til DISPUK í seinasta lagi 15.juni 2005.

**Skeiðnummar: 715-05**

Skeiðslýsing og umsóknarblað fæst hjá skrivaranum Joan Andersen, DISPUK á telduposti andersen@dispuk.dk ella hjá www.dispuk.dk

**Fleiri upplýsingar:**
DISPUK, Stationsvej 13, 3070 Snekkersten
telefon +45 4922 5161 - telefax +45 4926 6156

# Hvat er klokkan?

Nú dagarnir leingjast, so fara vit skjótt at flyta klokkuna 1 tíma fram.

Tí ræður tað um at hava eina klokku.

Tit børn, komið í sparikassan og fáið eina Odda-klokku.

Verið sera vælkomin!




SUÐUROYAR SPARIKASSI

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Margarin-fabrikkin**

Margarinfabrikkin er eitt virkishús fyri børn og ung.

Í tryggum og rúsfríum umhvørvi ber til hjá teimum ungu at stuttleika sær við hópin av ymsum ítrivum allar gerandisdagar.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Pedagogur og hjálparfólk til Margarinfabrikkina

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Margarinfabrikkina eftir:**
- einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. apríl 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum hjálparfólki at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. apríl 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta at tú**
- er áhugað/ur í at arbeiða við størri børnum og ungum
- er opin, vísir ábyrgd og er positiv/ur
- er skapandi, fyrikomandi og kann arbeiða sjálvstøðugt

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Boga Andreasen, varaleiðara, tlf 312217.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. mars 2005. Viðmerk umsóknina "Pedagogur/hjálparfólk til Margarinfabrikkina".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Heilsu- og umhvørvisdeildin**

- er partur av teknisku deild í Tórshavnar kommunu.

Heilsu- og umhvørvis-deildin umsitur mál, sum sambært umhvørvislóg-gávuni eru løgd undir kommununa at umsita.

Tekniska deild heldur til í miðbýnum í Havn saman við byggi- og býarskipanar-deildini, snarskivuni og postverkinum í gamla posthúsinum.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Starvsfólk til heilsu- og umhvørvisdeildina

Á heilsu- og umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu, verður søkt eftir dugnaligum fólki til spennandi og avbjóðandi starv, har tú serliga kemur at arbeiða við heilsu- og umhvørvismálum. Umhvørvið viðkemur okkum øll, og her hevur tú møguleika at gera tína ávirkan galdandi saman við dugnaligum starvsfólki í umsitingini.

**Førleikakrøv**
Tann, ið sett/ur verður, skal hava útbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur, tekniskt hjálparfólk ella hava líknandi útbúgving, helst innan heilsu- og umhvørvi. Ynskiligt er, at tú hevur royndir innan øki og hevur kunnleika innan almennu fyrisitingina.

**Persónligir eginleikar**
Dentur verður lagdur á, at tú:
- ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- arbeiðir við nærlagni og skynsemi
- er fyrikomandi og dugnalig/ur at samstarva

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 18. mars 2005. Viðmerkið umsóknina "Heilsu- og umhvørvisfólk".